# SAMFELAGSTILVIT 2018



FØROYATELE



# Samfelagstilvit

Hjá okkum í Føroya Tele-samtakinum er samfelagstilvit ein natúrligur partur av gerandisdegnum, ið byggir á eina søguliga tíð og okkara leiklut í samfelagnum í yvir 110 ár.

Fjarskifti er ein týdningarmikil lutur í grundarlagnum undir einum nútíðarsamfelagi, og tað er tískil okkara ábyrgd at tryggja, at fólk og fyritøkur hava eitt gott og trygt samband, sum kann stuðla til kappingarføri og menning í samfelagnum, sum vit eru ein partur av.

Okkara leiklutur í samfelagnum er at knýta føroyingar í einfalt samskifti, og henda leiklutin gera vit okkara ítasta at greiða úr hondum hvønn dag.

Hetta speglast aftur í okkara arbeiði við samfelagstilvit, ið er hugsað inn í okkara kjarnuvirksemi.

Jan Ziskasen,
Samtaksstjóri

## Lyklatøl 2018

**380 Mkr.**

Umsetningur hjá samtakinum

**35 Mkr.**

Útgoldið í vinningsbýti til Føroya landsstýri

**97,7 Mkr.**

Útgoldið í løn, íroknað eftirløn og arbeiðsmarknaðargjaldi

**9 Mkr.**

Goldið í partafelagsskatti



# Talgilda framtíðin

Tað er eingin loyna, at framtíðin er talgild, og tað setur stór krøv til undirstøðukervið, ið skal vera við til at mynda hesa framtíð. Okkara mál er at leggja lunnar undir einar Føroyar sum talgilt undangonguland og stuðla framgongdini. Hetta málið skal vera til gagns fyri borgarum, vinnulívinum og samfelagnum sum heild.

**36.000**
**metrar**

av fipurkaðalum
lagdir síðani oktober 2017

**62**
**VDSL skáp**

eru uppsett til at tryggja
eina hægri breiðbandsferð

**500**
**húsarhald**

hava fingið fipur
til heimið í 2018

## Betri samband í øllum Føroyum

Á Føroya Tele arbeiða vit við sveittabrot, so allir føroyingar fáa nyttu av talgilda framburðinum, tí umframt at leggja nógva orku í at bjóða tað besta farnetið av sínum slagi í Føroyum, arbeiða vit miðvíst við at útbyggja eitt framtíðarhóskandi breiðband.

Síðst í 2018 gjørdist møguligt hjá fyrstu privatkundunum at keypa fipurbreiðband. Í fyrstu atløgu eru tað húsarhald í útvaldum býarpørtum, ið kunnu keypa hesa nýggju tænastuna, men so hvørt sum netfelagið útbyggir undirstøðukervið, fáa kundar kring alt landið hendan møguleika.

Við einum fipurbreiðbandi kann kundin fáa eina ferð upp á 1Gbit í dag. Tískil letur eitt fipursamband upp fyri teimum møguleikum, ið liggja fyri framman í talgilda samfelagnum. Í síðsta enda hongur alt sostatt á kervinum, sum er okkara uppgáva at røkja og menna.

# Millum bestu farnet í heiminum

Tað krevur sostatt áhaldandi íløgur og áhaldandi menning fyri at røkka hesum máli um, at í Føroyum hava vit eitt undirstøðukervi í avgjørdum heimsklassa.

Áhaldandi íløgurnar í landsumfatandi farnetið, sum er at meta millum tey bestu í øllum heiminum, tryggja, at møguleikin fyri góðum samskifti altíð er til staðar, óansæð hvat vit eru stødd í landinum.

Ómaksleyst samskifti skulu allir føroyingar kunna taka fyri givið, tí tað er treytin fyri at virka í heimssamfelag okkara, og tað er hesa uppgávu, ið ágrýtnu starvsfólk okkara greiða bæði dag og nátt.

Hetta hevur ført við sær, at okkara farnet er í avgjørdum heimsklassa og kann bera vaksandi ferðsluna, lúka nútímans krøv og nøkta tørvin hjá tí einstaka føroyinginum.

**8.954.488**

SMS-boð send

**63.706.651**

minuttir tosaðir í fartelefon

**1.838.092**

GB hava kundar hjá okkum brúkt

Sum liður í at varðveita støðuna, vórðu í 2018 millum annað gjørdar íløgur í at uppstiga farnetið til 4,5G á útvaldum økjum, har datanýtslan er hægst. Eisini varð ítøkiliga arbeitt við at gera dekningin enn betri í bygdum og býum í øllum landinum.

Harafturat hevur Føroya Tele í samstarvi við Landsverk útbygt farnetið til at fevna um allar tunlar í Føroyum fyri at gera ferðsluna enn tryggari í tunlum.

Føroya Tele og Huawei gjørdu í 2018 avtalu um nýggja, framkomna farnettøkni. Verkætlanin er farin av bakkastokki, og eftir ætlan verður farnetið hjá Føroya Tele raðfest millum tey fyrstu í øllum heiminum at fáa nýggjasta ættarliðið av farnettøkni; nevniliga 5G.

# Útbreiðsla






- Farnetið hjá Føroya Tele dekkar 96,8% av øllum landøkinum í Føroyum.
- Farnetið varð útbygt á 12 útvaldum støðum, sum dekka yvir land- og sjóøki.
- Útgerð á 17 mastrum varð fínstilla og optimerað fyri at betra um sambandi

● *Dagførdar antennur í 2018*

# Starvsfólkatrivnaður

Hjá okkum á Føroya Tele er tað ein natúrligur partur av okkara gerandisdegi at varða av trivnaðinum hjá starvsfólkunum í bestu bókstaviligastu merking. Dugnalig starvsfólk er ein hornasteinur undir okkara virksemi, tí tey mynda okkara virksemi.



## Dugnalig starvsfólk

Mangt vatn er í ánni runnið, síðan Ólavur á Heygum, bóndi, og hareftir Telefonverk Føroya Løgtings fóru undir at knýta bygdir og býir saman í 1906. Hóast Føroyar eru staddar úti á opnum sjógvi, eru vit í dag eitt framkomið samfelag, har landamørk og frástøða hava lítið at siga. Vit røkka runt knøttin akkurát sum einki.

Í meira enn 110 ár hevur Føroya Tele tænt føroyingum, og føroyska fólkið hevur verið hjartaslátturin í fyritøkuni. Men pulsurin í dag er ein heilt annar, og tað føroyska fólkið setir heilt onnur krøv í einum heimi, sum broytist dag frá degi, og kappingin er ein natúrligur partur av gerandisdegnum.

Harvið hevur Føroya Tele ábyrgdina av at taka pulsin og tryggja, at starvsfólkini trívast í hesum skiftandi umstøðunum.

Vit arbeiða miðvíst við at skapa eitt arbeiðsumhvørvi, har ið starvsfólk eru tilvitað um teirra leiklut, og hvat verður væntað av teimum í teirra leikluti í virkseminum, umframt at tey trívast, eru motiverað og mennast í tráð við okkara mál.

Skulu vit ganga á odda í føroyska framburðinum, so má starvsfólkatrivnaður raðfestast, tí tað er at enda ein fortreyt fyri góðskuni, ið kundin fær. Tískil gera vit eina árliga og nágreiniliga trivnaðarkanning, har ið úrslitini verða nýtt til miðvíst at skipa arbeiðið við trivnaðinum og javnan at skipa fyri tiltøkum, so sum fakligum starvsfólka-, leiðara-, og deildardøgum til frama fyri vitanardeiling, samstarvi og menning í heila tikið.

## Útbúgving og samstarv

Við tøttum tilknýti til skúlar, lærustovnar og fyritøkur virka vit fyri at skapa gjøgnumskygni og áhuga fyri okkara kjarnuvirksemum og knýta møgulig framtíðarstarvsfólk at fyritøkuni. Umframt at lesandi koma í starvsvenjing ella skriva serritgerðir við støði í Føroya Tele og fáa ítøkiligar virkisroyndir, so fáa vit ágóðan av, at starvsfólk fáa innlit í nýggja gransking og ástøði, sum stuðla til nýhugsan og betranum av verandi virksemi.

Vit eggja til áræði og eldhuga hjá starvsfólkum við at virka fyri persónligari og fakligari menning alt arbeiðslívið. Alt eftir lívsumstøðum hjá starvsfólkunum, kunnu arbeiðskarmarnir liðiliga skipast eftir ynskjum og tørvum, um umstøðurnar hjá samtakinum loyva tí.

**77 í arbeiðsgleði**

Í árligu trivnaðarkanningini skorar okkara arbeiðsgleði eitt indeksstig á 77. Hetta merkir, at arbeiðsgleðin hjá starvsfólkum á Føroya Tele er munandi omanfyri miðal á danska arbeiðsmarknaðinum og millum bestu fyritøkur í Norðurlondum.

Við viðkomandi átøkum og tiltøkum arbeiða vit miðvíst við at halda og betra enn meira um arbeiðsgleðina.

**195 starvsfólk**

Við ársenda í 2018 starvaðust 195 fólk í Føroya Tele-samtakinum, svarandi til 178 ársverk

**15-72 ár**

Aldurspennið í samtakinum

**7 lesandi**

í lestrarstarvi

**10 lærlingar**

Innan handil, skrivstovu, KT og datatøkni

# Kundatryggleiki og álit

Vit tæna føroyingum, og fólkið er hjartaslátturin í fyritøkuni. Tað er tískil umráðandi, at okkara kundar hava álit á okkum og kenna seg tryggar, tá teir brúka okkara vørur og tænastur. Tískil syrgja vit altíð fyri, at tryggleikin er í hásæti, samstundis sum vit stremba eftir at hava eitt skilligt og álitandi samskifti við okkara kundar.

## Nærverandi kundasamskifti

Hvør einstakur kundi skal kenna seg væl vegleiddan og kunnaðan, so hann fær allan ágóðan av okkara vørum upp á ein tryggan hátt.

Tá ið tað ræður um at tryggja ein tryggleika og eitt álit, er samskiftið við kundarnar eitt tað týdningarmesta amboðið. Vit arbeiða miðvíst við at tryggja eitt nærverandi og álitisfult kundasamskifti, sama um vit tosa ella skriva við kundan.

Í Telebúðunum leggja vit stóran dent á at veita tænastur og ráðgeving við støði í tørvinum og ynskinum hjá tí einstaka kundanum, so hann fær eitt gott upplivilsi andlit-til-andlit við handilsfólkið.

Tað sama er galdandi, tá ið Kundatænastan og Supportin hava telefon- og/ella teldupostsamskifti, og tá ið vit svara fyrispurningum á sosialum miðlum, har ið vit sum heild leggja upp til, at kundar og almenningurin kunnu geva okkum íkast og afturboðan.

Felags fyri allar okkara samskiftispallar er, at teir mynda útbúgvin starvsfólk, ið duga at samskifta greitt, so at eitt til tíðir fløkjasligt tøknimál verður drigið niður á eitt málsligt støði, ið ein og hvør kundi skilir.

**63.000**

uppkøll til samtakið í 2018

**31.200**

teldupostar vórðu avgreiddir í 2018

# Íløga í økt kundanøgdsemi

Vit leggja stóran dent á kundanøgdsemi, ið vit gera íløgur í hvørt ár. Okkara mál er at veita ta bestu kundatænastuna, ið tekur hædd fyri tørvinum hjá tí einstaka brúkaranum og talgilda samfelagnum sum heild.



Vit seta altíð kundan í miðdepilin í okkara virksemi, soleiðis at vit kunnu menna innanhýsis førleikar til at skapa einfaldar loysnir til frama fyri kundan.

Í 2018 gjørdu vit stórar íløgur til tess at økja um kundanøgdsemið; bæði hjá vinnukundum og kundum okkara á Ver. Hesar íløgur vórðu gjørdar við støði í ta árligu kundakanningini, ið gevur okkum eitt týðiligt innlit í tørvin hjá tí einstaka brúkaranum.

Við støði í úrslitunum frá árligu kundakanningini hava vit millum annað latið eina nýggja, stásiliga Telebúð upp í høvuðssæti okkara í Hoyvík og dagført allar okkara fimm heimasíður; ft.fo, ver.fo, net.fo, shefa.fo og tv.fo.

Harumframt hava vit víðkað telefontíðina hjá Supportini, soleiðis at hon nú svarar telefonini yrkadagar til kl. 20 og leygardagar kl. 10-14.

# KT-trygdarpolitikkur

So hvørt sum heimurin gerst alsamt talgildur, og alsamt fleiri tænastur verða fluttar út á internetið, veksur tørvurin á einum tryggum kervi, ið dataferðslan ferðast á. Hetta er nakað, ið vit miðvíst arbeiða við og áhaldandi skipa virksemið hjá okkum eftir.

Allar skipanir, tænastur og mannagongdir virka eftir strongum trygdarkrøvum og verða regluliga granskoðarar eftir galdandi lógarkrøvum. Eisini ganga vit á odda í strategiskum samstørvum við viðkomadi samstarvsfelagar um at virka fyri, at kundar, stovnar og fyritøkur í Føroyum kunnu virka undir tryggum talgildum kørmum.




## Talgildi Samleiki

Sum størsti leikarin á føroyska fjarskiftismarknaðinum meta vit, at tað er ein týdningarmikil leiklutur at vera við til at dríva og menna samfelagið innan samskiftisøkið. Tað gera vit millum annað við at vera ein aktivur viðleikari í verkætlanini "Talgildu Føroyar", har ið vit í einum samtaki við Klintra standa fyri at menna ein føroyskan talgildan samleika.

Talgildi samleikin fer at kunna nýtast til innritan, eyðmerking og undirritan á portalum og snarskivum, bæði hjá stovnum, myndugleikum og fyritøkum. Fyrimunirnir við eini felags talgildari loysn sum hesari eru, at tað ikki skulu stovnast fleiri ymiskar skipanir fyri tær einstøku tænasturnar, har ið eyðmerking og innritan er neyðug.

Ein tílík felagsloysn verður sostatt gagnlig fyri alt samfelagið.

# Samstarv við Føroya Politi og Gjaldsstovuna

Vit eru við í nýggjum samstarvi við Føroya Politi og Gjaldstovuna um at betra KT-trygd í Føroyum. Orsøkin, at tað júst eru hesir tríggir partarnir, sum fara í eitt samstarv, er, at Gjaldstovan, sum er stovnur undir Fíggjarmálaráðnum, umsitur KT-trygdina í stórum parti av almenna KT-undirstøðukervinum.

Føroya Tele umsitur týðandi partar av øllum samskifti inn í landið og er tí ein virkin viðleikari í arbeiðnum at styrkja KT-trygdina. Løgreglan viðger møgulig ólóglig viðurskifti, um roynt verður eitt nú at bróta inn í KT-skipanir í Føroyum, og er tað tí eisini viðkomandi, at løgreglan luttekur í hesum samstarvi.

Ígjøgnum upplýsing og við tøkniligum loysnum er endamálið við samstarvinum at hjálpa føroyskum stovnum, fyritøkum og einstaklingum betur at verja seg móti KT-álopum. Sum heild vil hetta styrkja KT-trygdina í Føroyum.

**12.457.249**

Óynsktir teldupostar steðgaðir

**15.776**

Teldupostar við virusi eyðmerktir og steðgaðir

**8.893.509**

Ferðir hava vit steðgað teldusníkum at rita seg inn á teldupostskipanir hjá føroyingum

**50**

Álvarslig DDOS (Distributed Denial Of Service) álop á skipanir, net og heimasíður eru steðgað.

# Umhvørvið og grønar loysnir

Vit hava øll eina ábyrgd at verja umhvørvið. Hjá okkum er málið at gagnnýta alt tilfar sum best, at nýta orku skynsamt, at fara væl um okkara øki og at sýna ein fyrimyndarligan atburð í samfelagnum sum heild.

Vit miða alsamt eftir, at tiltøk, sum minka um el-nýtsluna og verja umhvørvið eins og skapa ein skynsamari rakstur fyri felagið, verða sett í verk. Tá ið íløgur verða gjørdar í nýggja útgerð, bygningar og tílíkt, er orkunýtslan av sera stórum týdningi.

Í einum samtaki sum Føroya Tele verður týðandi mongd av pappíri nýtt. Í tí dagliga verður miðað ímóti at skriva so lítið út sum gjørligt. Alt papp og pappír, sum verður burturbeint, fer til endurvinningar, og alt lívrunnið tilfar frá matstovuni verður komposterað á staðnum.

Tað sama er galdandi fyri sligið gras og vøkstur annars uttanfyri. Vit gera nógv burturúr, at burturkastið verður beint burtur so umhvørvisvinarliga sum gjørligt.

## Fríkøling

Vit hava skift alla køling út við CE-motorar og brúka fríluftskøling í øllum okkara bygningum. Fríluftkøling merkir, at øll luft verður natúrliga endurnýtt, og harvið uppliva vit sera góða køling og nógva sparing. Fríluftkøling egnar seg væl til føroyska veðurlagið, ið sjáldan fer upp um 20 hitastig.

1

**PRINT PAPPÍR**

Nýtslan av printpappíri og brævbjálvum á Føroya Tele er minkað niður í helvt seinastu 10 árini.

2

**BYGNINGAR**

Føroya Tele hevur í alt 150 bygningar í Føroyum. Vit hava leypandi greiningar av øllum okkara bygningum, og um onkur bygningur brúkar ov nógva orku, greina vit umstøðurnar og tryggja skilabetri loysnir.

3

**FRÍKØLING**

Skiftið frá kompressarum til fríkøling í 2015 hevði við sær eina árliga sparing áljóðandi 500.000 kwt.

# Battaríir

Nógv av okkara útgerð koyrir við battaríum – á øllum fjallatoppum, tøknihúsum og í Klingruni, ið er høvuðssætið í Hoyvík. Týdningurin av battaríum er, at tey koyra víðari undir streymsliti. Vit hava bólkað battaríini í tríggjar bólkar, ið vísa livitíð alt eftir støðd av bygningum.

Hvørt ár verða battaríir, ið nærkast ásetta livialdrinum, royndarkoyrd. Um royndirnar ikki vísa tekin um brek, verða battaríini ikki skift út. Fyri at tryggja, at battaríini liva so leingi sum gjørligt, er avgerandi, at tey standa í røttum hitalagi, sum er undir 20 hitastig. Okkara fríkølingsskipan tryggar, at hitalagið ongantíð fer upp um 20 hitastig.

Eitt battarí, ið hevur ein miðal livialdur upp á 12 ár, kann halda upp í 20 ár, um tað stendur í rætta hitalagnum. Hinvegin kann livitíðin styttast heilt niður í 6 ár, um hitalagið fer upp um tey 20 hitastigini.

# Klingran

Høvuðssæti okkara í Hoyvík, Klingran, koyrdi upprunaliga við kompressarum. Í 2015 valdu vit at skifta yvir til fríluftskøling í øllum tøknirúmunum og byrjaðu samstundis at endurnýta avlopshitan fyri at hita Klingruna upp við. Hetta hevði við sær eina nógv betri, bíligari og grønari køling.

Í 2011 varð øll gomul ljósútgerð skift út, og í dag hevur Klingran ongar kontaktir og lýsir sostatt einans við ljósfølarum. Hetta merkir, at ljósið tillagar seg alt eftir ljósi og røring í teimum ymisku rúmunum. Ljósið verður sostatt stýrt eftir, um fólk eru í einum rúmi, og hvussu ljósmongdin í rúminum er.

Harumframt eru vit í ávísan mun byrjað at skifta yvir til LED, har ið tað gevur meining. Støðan er tó hon, at núverandi ljóssparingin koyrir so mikið væl, at tað fyribils ikki loysir seg at skifta hana út. Vit skifta tískil ikki skipanir óneyðugt, men hyggja sjálvsagt leypandi eftir øðrum grønum loysnum í tráð við, at skipanir eldast.

4

**BATTARÍ**

Elsta battaríið hjá okkum er frá 1993 - 26 ára gamalt - hóast vanligi livialdurin er 20 áleið ár.

5

**HITASTÝRING**

Hitastýring (CTS) stýrir øllum hita og allari útlufting í Klingruni.
Áðrenn hitastýringina høvdu vit ein veitingarhita á 79 gradir, men ídag eitur hann 54 gradir.

6

**LJÓSFØLARAR**

Ljósfølaranir laga seg eftir ljósmongdum í rúmum.

Tað vil millum annað siga, at teir gevur meira ljós um veturin og minni ljós um summarið

# Nærsamfelagið

Í yvir ein mansaldur hava vit havt ein stóran leiklut at gera einfalt samskifti og tryggjað sambond millum menniskju. Vit knýta samfelagið saman, og harvið stytta vit um fjarstøðuna millum teg og meg. Vit liva jú í einum tíðarskeiði, har ið nærleiki ikki longur verður máldur í metrum.



Sterkast av øllum bondum er tey bond, ið vit menniskju knýta. Og tað man vera grundin til, at vit menniskju ongantíð gevast við at knýta tey. Hesi bond knýtast tó best, og vara eisini longst, tá møguleikin fyri góðum samskifti er til staðar.

Hjávera og samvera er partur av okkara leikluti í samfelagnum. Vit ynskja allatíð at hava ein aktivan leiklut í samfelagnum, og vit vilja tryggja, at tær tænastur og tær vørur, sum vit veita, gagna samfelagnum og eru við til at byggja brýr millum menniskju og styrkja felagsskapir.

Hetta kemur til sjóndar í stuðulsavtalum, vit gera, og tiltøkum, vit skipa fyri. Her verður stórur dentur lagdur á, at allur latin stuðul verður til fyrimuns fyri báðar partar. Tað merkir, at vit fara inn í eitt aktivt samstarv, ið báðir partar fáa ágóðan av.

# Íverksetarahúsið

Vit eru høvuðstuðul hjá Íverksetarahúsinum í Klaksvík. Eitt av okkara aðalmálum er at stuðla framburðinum í føroyska samfelagnum. Samstarvið við Íverksetarahúsið er ein viðkomandi háttur at stuðla hesum máli og verða við til at styrkja nýskapan og íverksetaraumhvørvið í Føroyum.

Umframt at skipa fyri FT Game Jam, samstarva vit við Íverksetarahúsið um onnur viðkomandi tiltøk og nýta avtaluna aktivt fyri at styrkja grundarlagið fyri íverksetan í Føroyum – heilt frá fólkaskúlanæmingum til royndar íverksetarar.

Føroyar hava tørv á fleiri íverksetarum og fleiri vinnuligum beinum at standa á, og tí hevur tað stóran týdning fyri okkum, at vit stuðla Íverksetarahúsinum og eru við til at leggja lunnar undir føroyska íverksetan.



# Pól Sundskarð og hiking.fo

At ganga fjallatúrar í føroysku náttúruni er vorðið eitt alsamt vaksandi ítriv millum bæði føroyingar og útlendskar gestir seinastu árini, og tað er við hesum í huga, at ítróttamaðurin Pól Sundskarð fór undir sína verkætlan hiking.fo, ið hevur til endamál at slóða fyri vaksandi rákinum.

Vit hava stóra virðing fyri málinum, ið Pól Sundskarð hevur sett sær fyri at røkka, tí eins og hann vil ganga á odda og gera spor til onnur at stíga í, so er okkara aðalmál at ganga á odda í føroyska framburðinum og slóða fyri einfaldari og framkomnari samskiftistøkni.

Vit ynskja at fylgja Póli og stuðla honum. Avtalan merkir, at Pól Sundskarð verður tikin við í arbeiðið at menna dekningin á farnetinum hjá okkum uppi í fjøllunum.

Hesum kann Pól Sundskarð hjálpa okkum við.



# Fótbóltssamband Føroya

At enda snýr tað seg um at sparka bóltin í málið og vinna, men fótbóltur er nógv meira enn bert eitt spæl. Fótbóltur er undirhald og ein uppliving, ið skal kunna deilast á netinum, meðan bólturin framvegis rullar.

Hesum skal Føroya Tele slóða fyri í framtíðini, so føroyski fótbóltsfjepparin fær eitt farnet í heimsklassa, meðan hann er til dyst. Føroya Tele er ein av høvuðsstuðlunum hjá Fótbólts-sambandi Føroya, og samstarvsavtalan inniber, at vit hava styrkt okkara farnetsamband á Tórsvølli og á øðrum fótbóltsvallum, har ið tørvur er á tí.

Fyrsta byggistigið varð farnetið á Tórsvølli, tí Tórsvøllur er skansi okkara, tá heimsins fótbóltsstjørnur vitja. Nú skansin er styrktur, so allir okkara kundar eru bundnir saman í eitt sterkt og framkomið farnet.



# Róðrarsamband Føroya

Síðani 2014 hevur guli Ver-liturin sett sín dám á tjóðarítróttin, tá stevnur hava verið í øllum landinum, og líka síðani hava vit verið fíggjarligi høvuðsstuðulin hjá Róðrarsambandi Føroya.

Eins og okkara farnet dekkar 96,8% av Føroyum á landi, røkkur farnetið eisini langt út á hav. Kappróðrarbátarnir skríddir við Ver er ein góð ímynd og áminning um góða dekningin á sjógvi.

Vit gleðast um samstarvið, sum eftir hondini er vorðið heilt nátúrligt fyri okkum.

Kappróður er okkara tjóðarítróttur, og hann eru vit øll góð við.



# First Lego League Føroyar

FFL Føroyar hevur eftir hondini mong ár á baki. FFL Føroyar er ein stuttlig kapping innan náttúruvísindi, tøkni og nýhugsan fyri 10 til 16 ára gamlar fólkaskúlanæmingar. Frá 2005 og til 2017 vóru í miðal sjey lið, ið kappaðust hvørt ár um at vinna kappingina, men í 2018, tá ið millum annað ein nýggjur fyriskipari varð settur, vaks talið til 15 lið.

First Lego League er ein altjóða kapping, ið verður hildin hvørt ár í 100 londum. Hon er heimsins største náttúruvísindaliga og tøkniliga kapping av sínum slagi við yvir 400.000 luttakarum. Kappingin er fyri børn í aldrinum 10-16 ár.

Vit stuðla First Lego League Føroyar og leggja karmar til tiltakið, sum hevur verið hildið í høvuðssæti okkara í Hoyvík í mong ár. Høvuðsendamálið við FFL er at kveikja áhugan fyri STEM-økini, ið er Science, Technology, Engineering og Maths, og hetta verður gjørt við støði í "læra við at gera tað"-mannagongdini. Hetta er alt førleikar, ið eru sera viðkomandi fyri kjarnuvirksemið hjá Føroya Tele. Vit gleðast um samstarvið við FFL Føroyar og møguleikan at verða við til at kveikja áhugan fyri tøkni hjá ungum spírum, sum kann verða fyrsta fet móti eini starvsleið innan hetta áhugaverda økið, sum vit sjálvsagt vilja vera við til at menna.



Í Føroya Tele samtakinum síggja vit tað sum okkara skyldu at vera tilvitaði um samfelagið kring okkum. At taka skynsamar avgerðir og ætlanir í mun til okkara kjarnuvirksemi, meta vit vera besti háttur at stuðla undir framburði í samfelagnum.

Arbeiðið við samfelagstilviti er íbúgvandi í háttinum vit virka á, og sum íblástur nýta vit FN Global Compact og Heimsmálini til at skipa okkara virksemi og átøk.

Harumframt inndraga vit viðkomandi áhugabólkar í arbeiðið og eru fegin um afturboðan frá starvsfólkum, kundum og øðrum áhugaðum. Hetta er við til at styrkja okkara samfelagstilvit.

FØROYA TELE